ELEKTRON

Systemfólk til Systemdeildina

Vit sóknast eftir einum fólki, at starvast í Systemdeildini.
Starvi› umfatar fjølbroyttar menningar-, vi›líkahalds- og stu›ulsuppgávur í ví›økisnetinum og lokalu plattformunum, m.a.:

- NT- innlegging og uppseting
- Sjálvvirkandi innlegging av brúkaraskipanum
- Verkseting og royndarkoyring av n‡ggjum skipanum til NT
- Markamót til Interneti›

Vit vænta, at tú hevur hegni til telduarbei›i á tekniskum stigi, og at tú setur teg skjótt inn í n‡ggjar skipanir og avbjó›ingar.
Vit leggja harumframt dent á, at tú dugir - og at tær dámar - at veita kundavinarliga tænastu á høgum stø›i.

Ta› er ein fyrimunur, um tú hevur eina tekniska útbúgving, t.d. sum verkfrø›ingur, datamekanikari e.l., og royndir vi› telduarbei›i/-forritan í netumhvørvi er eisini ein fyrimunur.

Tú mást bæ›i duga at arbei›a sjálvstø›ugt og í bólki. Tú mást sum persónur klára at hava fleiri bóltar í luftini í senn og vera fyrireika›ur upp á, at vi›hvørt er ney›ugt at arbei›a undir ávísum tr‡sti.

Vit bjó›a
- Eitt spennandi og avbjó›andi starv, vi› dugnaligum og beinasomun starvsfeløgum
- Gó›ar útbúgvingarmøguleikar
- Løn eftir førleika

Um tú vil vita meira
Ert tú vælkomin at seta teg í samband vi› Niels Chr. Nolsøe, stjóra, á telefon 31 45 05 ella á telduposti ncn@elektron.fo.

Umsøknir skulu ver›a okkum í hendi innan 31.10 2000, og skulu stílast til Niels Chr. Nolsøe, P/F Elektron, Staravegur 9, 100 Tórshavn.

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekniskum og handilsligum vi›urskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum.

Størstu partaeigarirnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsst‡ri.

PF ELEKTRON
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384
e-mail: info@elektron.fo

stephanssons hús

SOV TÆR MEGI OG MÁTT
Heilsubótarmadrassin eitur MAGNETO-TEX
Linnar pínu, styrkir blóðrenslið og tú svevur sum steinurin.
Bið um fleiri upplýsingar
Sosialurin - 311820

ÍSINKRAMM • AMBOÐ • SÚKKLUR
MÁLING • EL-LUTIR
D. J. ENNI
TVØROYRI
Tel. 371061 - 210061

SKEIÐSDEPILIN Á LANGASANDI
- Byrjanarundirvísing í føroyskum og enskum
- Altjóða skeið í samstarvi við Cambridge University
- Serskeið eftir ynski

Lætt, stuttligt, mennandi
Tel. 422574 - Fax 422521
www.depilin.fo
Sosialurin - 311820

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo


Stillads
Forskalling
Er ætlan at keypa ella leiga:
- Forskalling og tilhoyr
- Forskallingsolja & sproytur, klams, konus, avstandsrør v.m.
- Facadestillads
- Trygdarrækverk
- Aluminium rullustillads
- Arbeiðsplatformar

THYSSENKRUPP -HÜNNEBECK
Leverandørurin til Føroysk byggivirkir í 28 ár
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820


Blomberg
Komfort-katalyse ovnur Beo 632
Fyrr 4.790,- NÚ 4.311,-

Blomberg
Komfort kókipláta MC 603
Fyrr 4.090,- NÚ 3.681,-
pf. KLEMENT PETERSEN
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60
Sosialurin - 311820

Lesið sosialin

Verkfrøðingur til Føroya Tele

Radiodeildin

Søkt verður eftir verkfrøðingi til radiodeildina á Føroya Tele. Radiodeildin er ein deild undir teknisku deild og ábyrgdarøki hjá radiodeildini eru m.a.:
- mikrobylgjuskipanir
- satelitt jørðstøð
- fartelefonskipanir
- sjónvarpssendinetið

Uppgávan er í høvuðsheitum at reka og menna alt innan radiosamskifti á Føroya Tele, herundir millumoyggja radiosamskifti, satelittskipanir, NMT og GSM radiostøðir, útvarps- og sjónvarps sendinetið.

Arbeiðsøkið er alt landið, tó við høvuðsstøð í Tórshavn.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og avvarandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jens J. Reinert á tel.: 303030.

Umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. november 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FR-110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355

Leys størv á Fiskaaling P/f

Við hesum verður søkt eftir tveimum álítandi starvsfólkum til Fiskaaling P/F. Tey, ið sett verða í starv, skulu, saman við øðrum, ar-beiða í vaktarskipan felagsins. Hetta inni-ber, at tey mugu vera fyrireikaði at arbeiða skiftandi arbeiðstíðir. Tað er ikki ein treyt, men ein fyrimunur um umsøkjari hevur ar-beiðsroyndir frá smoltstøð ella annan før-leika, sum kann gagnnýtast í starvinum. Hevur tú áhuga fyri einum spennandi og avbjóðandi starvi, kanst tú seta teg í samband við Fiskaaling P/F, Símun Joensen. Umsóknir við frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguliga útbúgving skulu sendast til:

Fiskaaling P/F
Við Áir
FO-430 Hvalvík
Telefon 474747
Teldupost:
Fiskaaling@fiskaaling.fo

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. oktober 2000.



# Greta fastir fyllir 103 í dag



*Greta avmyndað seinasta hósdag á ellisheiminum "Lottehjemmet." Mynd: Nordfoto*

**- Hon hevur verið so ótrúliga røsk, og hevur havt týdning fyri nógvar føroyingar, sum hava vitjað í Keypmannahavn, sigur 73 ára gamla Dinna Joensen úr Lorvík, um fastrina, sum flutti til Danmarkar eftir fyrra heimsbardaga**

FØÐINGARDAGUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Á Ellisheiminum "Lottehjemmet" í Koksgade, ein síðugøta til tann penara endan á Valby Langgade í Keypmannahavn, situr ein elligomul føroysk kvinna. Hon var fødd 21. oktober 1897 á Mýruni á Toftanesi í Lorvík. Hon er systir navnframa føroyska politikkaran Jákur Fr. Øregaard og ein beiggi hennara livir enn. Hann eitur Hans Petur Øregaard, hevur verið politistur alt lívið í Danmark og var í Føroyum undir Klaksvíksstríðnum í fimtiárunum. Hann er í dag 85 ár.

Á Ellisheiminum situr eisini svigardótturin Lis. Hon er dóttir gamla sýslumann í Vestmanna, Gunnar Dahl Olsen, og er 75 ára gomul. Tær báðar hava havt nógv saman gjøgnum lívið og tá Greta fór á Ellisheim fylgdi Lis, sum er deyv, við.

Í dag eru blómur at síggja á Ellisheiminum Lottehjemmet í Koksgade. Greta hevur verið eitt sindur órógvað seinastu dagarnar. Longu hósdagin sendi Sosialurin ein myndamann frá Nordfoto at taka mynd av henni og eitt ellisheim ger altíð eitt sindur burturúr, tá fólk gerast so gomul.

Føroyingar náa høgan aldur. Navnframa Drikka á Fløtti við Gjógv náddi tey 105 áðrenn hon lat eyguni aftur fyri seinastu ferð. Í Vestmanna situr 102 ára gamli Jógvan Andrias Hansen. Eitt sindur dulur, men frammi hvønn einasta dag. Herfyri fylti Andrea Sivertsen við Gjógv 100 ár. Beiggi hennara Dia, sum nú er deyður, gjørdist 101 ára gamal. Alma Rustin í Fuglafirði fyllir í næstum 100 og hon hevur úr at gera at fyrireika føðingardagin. Ein kvinna sitir á Ellisheiminum Áargarði á Sandi, hon er 101 ára gomul. Tað er Jóhanna Mikkalina Poulsen.

### Skrøpp og røsk

-Fastur hevur altið virkað eitt sindur skrøpp. Hon hevur havt lyndið at sagt nokk so nógv, men tú hevur altíð vitað hvær tú hevur havt hana. Eg haldi, at hon hevur verið ein stór persónligheit, sigur Dinna Joensen.

- Vit eru tvær systrar, Malla og eg. Foreldur okkara doyðu, tá vit vóru heilt ungar og ti hava vit búð hjá abba og ommu ella í barndómsheiminum hjá Gretu fastir. Fyri ikki so langari tíð síðan var eg og vitjaði Gretu fastir. Hon er deyv nú, men forstandarinnan rópti í oyra á henni, hvør var komin. Hon hugdi upp á meg og spurdi smílandi: "Malla! hvussu hevur Dinna tað?" Hon kendi, tók bara feil av nøvnunum á okkum, men var annars klár, sigur Dinna Joensen.

### Tænti hjá bankastjóra

Undir fyrra heimsbardaga fór Greta til Havnar at tæna hjá stjóranum í Føroya Banka. Hesin flutti aftur til Danmarkar beint eftir stríðslok og Greta fór við. Hon tænti fyrst og fór síðan at arbeiða á eini seymistovu.

Í Danmark møtti hon manninum Harald Bendsen. Hann arbeiddi alt lívið á Tuborg. Tey fingu sonin Egon og hesin tók útbúgving sum tanntekninari.

- Abbi var einaferð niðri og vitjaði Gretu. Hann tosaði nógv um hesa ferð og alt hann hevði upplivað og serliga hugtikin var hann av arbeiðsplássinum hjá Harald, Tuborg. Hetta tosaði hann um til sín doyggjandi dag, sigur Dinna Joensen.

Greta kom heim til Føroya at vitja við tí fyrsta Tjaldrinum í 1925.

Eftir seinna heimsbardaga kom Greta við soninum heim til Føroya at arbeiða. Sonurin gjørdi handilstenn og mamman hjálpti honum. Tey fyrstu summrini búðu tey hja skyldfólki í Leirvík, men seinni so bygdu tey sær egin hús at arbeiða í. Tað eru húsini, sum Norðoyar Sparikassi eigur í dag. Tey vóru bara her um summrini og lógu vetur í Danmark.

### Svaningarstaður fyri føroyingar

– Nógv fólk hava vitja Gretu í Keypmannahavn og hon var eisini røsk at vitja sjúkar føroyingar, sum komu at fáa sær heilsubót á ríkishospitalinum. Fyrr var so vánaligt samband og mong doyðu í Danmark. Hon var hjá teimum seinstu tíðina og kundi fortelja teimum eftirsitandi í Føroyum um seinastu dagarnar, sigur Dinna Joensen.

Greta og Harald vóru væl fyri. Tey áttu hús í Valby Langgade og eina íbúð í Saxogade, ein síðugøta til Istedgade. Her búðu Egon og Lis.

### Jólapakkar

- Fastir sendi altíð jólapakkar heim.. Eg eri fødd í 1927 og so langt aftur eg kann minnast,``` kom altíð ein pakki frá fastir til jóla. Tá var frukt ikki vanlig í Føroyum og eg minnist at vit vóru sent út at gera børnunum í familjuni eitt hálvt súrepli ella eina appelsin. Eg fekk eisini kjóla til jóla á hvørjum ári, sigur Dinna Joensen.

Vit ynskja Gretu hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMAT.
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 179.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA (Sýnaður 12-99)
Skrás.: 01-05-95
Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL L/B
Skrás.: 13-01-99
Km.: 28.000
Prísur: 165.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,6 AUT. GEAR
Skrás.: 17-04-96
Km.: 62.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 30-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 154.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 52.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear
Skrás.: 13-06-96
Km.: 82.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99)
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA CARINA E 1,6 CDX (Sýnaður 01-00)
Skrás.: 16-10-96
Km.: 39.000
Prísur: 117.600,- Garanti*

HONDA ACCORD 1,8
Skrás.: 01-11-97
Km.: 53.000
Prísur: 148.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,8 L/B
Skrás.: 30-12-93
Km.: 140.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 13-12-95
Km.: 87.000
Prísur: 78.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 30-05-94
Km.: 107.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

FORD MONDEO 2,0 AIR-CON
Skrás.: 02-07-96
Km.: 52.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Gli (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 02-07-90
Km.: 170.000
Prísur: 65.600,-

FORD FIESTA 1,3i CL (Sýnaður 12-99)
Skrás.: 08-06-91
Km.: 130.000
Prísur: 30.600,-

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90
Km.: 122.000
Prísur: 57.600,-

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 27-07-93
Km.: 115.000
Prísur: 58.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 Xli (Sýnaður 09-00)
Skrás.: 11-06-91
Km.: 108.000
Prísur: 48.600,-

KIA SEPHIA 1,5
Skrás.: 17-04-97
Km.: 59.000
Prísur: 62.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 119.600,- Garanti**

SUZUKI BALENO 1,6 GLX
Skrás.: 26-06-96
Km.: 52.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

AVHEINTINGAR-TILBOÐ

TOYOTA CAMRY 1,8 XL (Sýnaður 04-99)
Skrás.: 30-06-88
Km.: 240.000
Prísur: 15.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 DX (Sýnaður 05-00)
Skrás.: 09-06-87
Km.: 221.000
Prísur: 15.600,-

NISSAN BLUEBIRD
Skrás.: 26-03-86
Km.: 192.000
Prísur: 2.000,-

VW TRANSPORTER V/ DUP. KABINU
Skrás.: 17-02-87
Km.: 190.000
Prísur: 8.600,-

VØRUVOGNAR

TOYOTA DYNA 150 V/ LAST
Skrás.: 24-02-97
Km.: 100.000
Prísur: 90.600,-

TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL
Skrás.: 05-11-86
Km.: 230.000
Prísur: 48.600,-

VW LT 35 VAN
Skrás.: 30-06-93
Prísur: 39.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00

Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820